FSV-B71 2-3 (2-1)

# Clayton søkti sínar gomlu

Einki er at siga til, um tey í Vágum nú iðra seg eitt lítið sindur um, at Clayton Soares í vetur skifti felag úr FSV til B71. Í øllum førum var Clayton høvuðsmaðurin, tá FS Vágar fyri fyrstu ferð í ár mátti stigaleyst av vøllinum.

Hetta hendi, tá B71 var á vitjan, men fyrstu løtuna var ikki so nógv, sum bendi á, at hetta skuldi geva heimaliðnum stórvegis trupulleikar.

Sonny Johansen og Jákup Joensen góvu nevnliga heimaliðnum greiða leiðslu í fyrra hálvleiki, men spenningurin kom tó í aftur, tá Clayton skoraði sítt fyrsta mál á degnum.

Eftir steðgin javnaði Eli Hentze við brotssparki, áðrenn Clayton aftur slapp at seta dagsskránna, og við sínum fjórða máli í trimum dystum sendi hann øll stigini til Sands.

Og so munnu teir hjá FSV annars iðra seg um, at teir ikki megnaðu at gera sær dælt av málmøguleikunum. Fleiri vóru av slagnum, og móti dystarenda var talan enntá um brotsspark, men í Waldemar Nowicki hevur B71 ein av landsins bestu málverjum, og hóast árini eru vorðin nøkur í tali, so eru kynstrini enn tey somu.

1-0: Sonny Johansen
2-0: Jákup Joensen
2-1: Clayton Soares
2-2: Eli Hentze, br
2-3: Clayton Soares

GÍ-B36 0-3 (0-1):

# Effektivir havnarmenn

**Hóast talan sjáldan gjørdist um teir púra opnu møguleikarnar, so megnaði B36 tríggjar ferðir at senda bóltin í GÍ-meskarnar, og harvið sleppa sær upp á oddin á stigatalvuni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað var sjáldan, at talan gjørdis um beinleiðis vandastøður í brotsteiginum, men tá hesar íkomu, so vóru havnarmenninir teir kaldaru*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Oddadystur stóð á skránni í Sarpugerði í Gøtu sunnudagin. GÍ, sum hevði fingið fult teir báðar fyrstu dystirnar á árinum, hevði vitjan av B36, sum við fýra stigum var á øðrum plássinum.

Bara hetta í sjálvum sær borgaði í øllum førum fyri, at tað vóru tvey av fremstu liðunum í landinum, sum skuldu takast, og júst dystirnir millum GÍ og B36 hava seinnu árini verið av tí heilt undirhaldandi slagnum.

### Tøtt uppgerð

Í so máta gjørdist dysturin sunnudagin eitt lítið vónbrot, tí tað var ikki sjálvt undirhaldið, sum var í fremstu røð gjøgnum teir 90 minuttirnar. Í øllum førum ikki, um undirhald er nakað, sum skal mátast í flótandi kombinationsspæli.

Hinvegin vóru tað aðrir lutir, sum vóru við til at lyfta undirhaldsvirðið. Gjøgnum tað mesta av dystinum var talan um eina sera javna uppgerð, har báðir partar sótu sera tætt í hvørjum øðrum, soleiðis at mótstøðan ikki slapp framat nøkrum møguleikum. Eisini soleiðis at liðini á henda hátt kundu trýsta hvønn annan at gera nøkur mistøk, tó at hesi vóru sera fá í tali. Var talan um trýst, so valdu partarnar aloftast tryggju loysnina við at lossa bóltin langt niðan eftir vøllinum, heldur enn at vága nakað á egnari hálvu.

Tað gekk tó tann vegin, at B36 skapti sær eitt lítið yvirtak. Serliga á miðvøllinum fingu teir gott tak, tá Alex dos Santos og Bárður Mortansson arbeiddu sera djúpt, men tað viðførdi so aftur, at John Petersen ofta var rættiliga einsamallur á toppinum.

Tað eydnaðist tó í fleiri atløgum at skapa nakað, sum líktist vandastøðum, og tó at bólturin aloftast varð ruddaðu til antin horna ella innkast, so góvu hesi møguleikan at halda fast um trýstið.

Og tað var eisini eftir eitt hornaspark, at B36 fekk leiðslumálið. Bárður Mortansson sendi hart móti nærmasta stólpa, og har kom ein flúgvandi Egil á Bø og snittaði bóltin í málið.

### Marginalar

Eftir hetta fall B36 nakað longur aftur á vøllin. Teir royndu kanska í størri mun at dúva upp á kontraspælið, men samstundis gav tað so eisini GÍ møguleika at skapa sær eitt trýst. Og tað var eisini ófatuliga nær við, at teir fingu løn fyri stríðið, men Magnus Skoralíð stútaði risa-møguleika á stólpan, tá Tróndur Vatnhamar annars fullkomuliga seldur, og so spurdist einki burturúr.

Seinna umfarið var tað leingi soleiðis, at dysturin ridlaði báðar vegir. B36 tóktist tó hava sera gott tak á í verjupartinum, har Pól Thorsteinsson og Jóhannis Joensen røktu miðverjusessirnar fyrimyndarliga væl.

GÍ royndi enn at trýsta, men fyri tað nógva vórðu teir bremsaðir av hart arbeiðandi B36-miðvøllinum. Eina einstaka ferð gjørdist talan tó um veruligan vanda, tá Bárður Mortansson – tykist hava ov ilt við at sleppa bóltinum – royndi seg við driblitúri á miðvøllinum. GÍ spældi seg skjótt niðaneftir, men Tróndur Vatnhamar stórbjargaði, tá Súni av brotsteigarmarkinum meddaði móti málinum.

Og so hendi tað, sum ikki mátti henda hjá GÍ. B36 fór í kontraálop niðan gjøgnum vinstru síðu, og úr stóra fjarstøðu og einum at kalla ómøguligum vinkli smekkaði Santos til. Hallur burdi ikki at havt stórvegis trupulleikar av skotinum, men hann megnaði ikki at halda bóltinum, og so var Jens Erik Rasmussen skjótur at pota í netið - og í roynd og veru drepa allan spenning í dystinum.

B36 fekk so eisini eitt mál afturat, og hesaferð var talan um sanna perlu, tá John heilfluktaði langt og høgt innlegg í meskarnar.

Tað var kanska talan um teir so væl kendu marginalarnar, sum vóru við B36 hendan dagin, men tað er so ein staðfesting, at júst hesir marginalarnir mugu vera við, um tú skalt fram í oddin. Har er B36 nú við sjey stigum, men hóast tapið, so eru gøtumenninir bert eitt stig aftanfyri.

**GÍ-B36 0-3 (0-1)**
0-1: Egil á Bø
0-2: Jens Erik Rasmussen
0-3: John Petersen
**GÍ:** Hallur Hansen– Leivur Hansen, Pól Ennigarð, Atli Gregersen, Hanus – Hans Pauli Petersen, Súni Olsen, Krzystof Popczynski, Magnus Skoralíð – Poul Henning Jacobsen, Vitus Kofoed
**B36:** Tróndur Vatnhamar – Kenneth Jacobsen, Jóhannis Joensen, Pól Thorsteinsson, Egil á Bø – Ronnie Samuelsen, Jens Erik Rasmussen, Arnbjørn Danielsen – Bárður Mortansson, John Petersen, Alex dos Santos
**Dómari:** Dagfinn Olsen. Kundi væl verið strangari, tá taklingarnar fullu aftan ífrá

# Við aftur

Jóhannis Joensen hevur seinastu vikurnar sitið uttanfyri við einum argandi skaða, og nýkomin til B36 er tað sjálvandi ikki júst tað, sum ein leikari helst vil.

Tí mundi smílið hjá Jóhannisi eisini vera størri enn hjá flestu liðfeløgunum eftir sigurin, og hann duldi ikki fyri, at tað kendist gott at vera viðaftur.

– Tað kanst tú ætla. Tað er jú tað, sum man helst vil, so eftir at hava sitið fimm dystir uttanfyri, gleddi eg meg til at spæla við aftur.

Og tað gekk bara væl hjá tykkum í verjuni. Vóru ikki trupulleikar við at finna spælið saman aftur?

– Nei, tað haldi eg ikki. Hjá mær sjálvum restar kanska nakað í konditiónini, áðrenn eg aftur eri ordiliga komin fyri meg, men í verjuni kanst tú í stóran mun dúva upp á royndirnar. Tað eydnast okkum so eisini at halda teimum frá nøkrum serligum møguleikum, so alt í alt eri eg sera væl nøgdur, segði Jóhannis Joensen at enda.

**-jm**

# Royndirnar mugu koma

Eftir tveir sigrar á rað, kom GÍ ordiliga niður aftur, tá teir taptu greitt fyri B36, men hóast hetta, so tóktist liðskiparin á liðnum, Pól Ennigarð, at vera rímiliga avkláraður um støðuna, tá vit fingu orðið á hann eftir dystin.



– Fyrst og fremst, so spæla vit ikki sum eitt lið í dag. Og so gera vit eisini alt ov nógv mistøk, soleiðis at bólttapini gerast ov nógv.

Men eftir tveir sigrar á rað skuldi sjálvsálitið annars verið í topp. Hví megnatit ikki at halda fast um spælið, sum hevur tryggjað tykkum tey stigini.

– Tað veit eg ikki. Tað er helst eisini ein staðfesting av, at vit hava so nógvar ungar leikarar á liðnum. Hesir mugu hava nakrar fleiri royndir, og tær fáa teir so bert við at spæla. Annað haldi eg ikki, at eg fái sagt um tað, segði altso Pól Ennigarð at enda.

**-jm**



# Mótstøðumenninir vóru grammari

ÍF miðverjin Áki Petersen spældi á Skála í fyrraárið, tá ið skálamenn fyri fyrstu ferð royndu seg í bestu deildini.

– Tað er týðuligt, at Skála hevur eitt væl betri lið nú, enn vit høvdu fyri tveimum árum síðani. Teir vóru væl skipaðir, og teir vóru rættuliga uppsettir beinanvegin. Vit høvdu als ikki fótað okkum, tá ið teir høvdu skorað tvey mál. Tíbetur vísti tað seg enn eina ferð, at moralurin var góður. Vit komu fyri okkum, men tað var ikki so nógv at siga til, at teir vunnu, heldur Áki Petersen.

*Hvat var veikleikin hjá tykkum?*

– Eg eri ikki illa nøgdur við okkara avrik. Kanska komu teir í so lætt framvið okkum onkra ferðirnar.

*Hvussu verður næstu ferð?*

– Tá fara vit at fáa vitjan av HB. Tað gleða vit okkum til, og vit ætla okkum avgjørt ikki at grava okkum niður. Eg haldi, at vit hava staðið okkum betri á heimavølli, enn vit hava gjørt á útivølli higartil í ár. So vit eru rættuliga spentir til hósdagin, sigur ÍF miðverjin Áki Petersen.

**- jh**

Skála-ÍF 4-3 (3-3):

# Stórt og glæsiligt fýrverk á Skála

**Fyrsta uppgerðin nakrantíð í bestu deildini millum skálamenn og fuglfirðingar var eyðkend av, at báðir partar í 1. hálvleiki høvdu nógv betri hug at leypa á, enn teir høvdu at verja**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Á Skála eru tey nú veruliga um at fara uppfrá – bæði so og so. Sigurin á ÍF sendi fyri fyrstu ferð Skála heilt upp í oddin á stigatalvun i*

Tað var undirhald fyri allar pengarnar á Skála. Ivaleyst iðrar kassameistarin seg um, at líkindini ikki vóru betri. Tað var fitt av fólki, men gongdin í fyrstu umføunum hevði lagt upp til, at tað skuldu vera uppaftur fleiri eygnavitni til fyrstu uppgerðina nakrantíð í bestu deildini millum Skála og ÍF.

Skálamenn vunnu 4-3. Tað er ikki so nógv at siga til tann sigurin. Fuglfirðingar vóru orduliga við uppá tað, og serliga í fyrra umfarinum løgdu báðir partar nógv fyri í álopsroyndunum.

Heimaliðið tóktist skula vinna stórsigur, eftir at teir fyrstu fimm minuttirnar høvdu lagt seg framum við tveimum málum. Málskjútti í báðum førunum var Bogi Gregersen, sum fyri fyrstu ferð í hesi landskappingini, hevði fingið pláss millum teir fyrstu ellivu.

Men fuglfirðingar komu fyri seg aftur, og teir bæði javnaðu og løgdu seg framum. Sjey minuttir eftir seinna heimamálið fingu teir um endan, tá ið Rúni Elttør var fyrstur á eftir frísparksinnlegg, og eftir at málverjin ikki hevði megnað at hildið. Á hálva tímanum var aftur galið í Skála verjuni. Bartal Eliasen royndi móti málinum, og eftir at málverjin hevði hálvbjargað, var Høgni Zachariasen, sum orsaka av skaða ikki hevði verið við í tveimum teimum fyrstu umførunum, fyrstur á returinum.

Ferðin var stór, og tættleikin var høgur. Tað gekk nógv fyri seg frammanfyri bæði málini, har tað minti ikki sørt um stóra fýrverkið frammanfyri Fredensborg fríggjakvøldið. Dupulti málskjúttin hjá Skála kundi havt skorað bæði eina og tvær ferðir afturat, og tað vóru eisini aðrir, sm tað gekk ramur brendaroykur at.

Lagið millum teir vitjandi fekk enn eitt stig uppeftir, tá ið Magni á Lakjuni fimm minuttir undan hvíldini legði ÍF framum. Upplegginum stóð álopsfelagin fyri. Eftir innlegg stýrdi Bartal Eliasen við høvdinum bóltinum fyri føturnar á Lakjumanninum, sum takkaði fyri og skor

Men fuglfirðingar megnaðu ikki at fara til hvíldina við 3-2 leiðslu. Í evstu løtu sendi Iulian Florescu hornaspark beinleiðis upp í handara málkrókin. Tað er kanska at undrast á, at málverjin letur bóltin sigla so langt, men tað gongur nógv fyri seg í málteiginum sovorna løtu, og Kartin Joensen slapp ikki tað, sum hann hevði ætlað sær.

### Kiksað innkast

Intensiteturin og ferðin vóru ikki so stór eftir steðgin, sum tey høvdu verið í fyrra umfarinum. Men tað vóru framvegis møguleikar báðar vegir.

Sigursmálið skoraði Jónhard Frederiksberg miðskeiðis í 2. hálvleiki. Støðan, sum bar málið við sær, var undarlig. ÍF átti innkast í vinstra borði. Vongverjin tóktist ætla sær at tveita bóltin frameftir, men so broytti hann ætlan og tveitti bóltin aftur eftir. Har var Jónhard Frederiksberg einsamallur, og hann lat sær ikki siga tvær ferðir. Við ferð streyk hann ímóti ÍF málinum. Teimum, sum hann møtti á vegnum, sneiddi hann framvið, áðrenn hann sendi bóltin í málið aftanfyri Kartin Joensen.

Sum seinna umfarið leið, royndi ÍF at svara aftur. Hanus Eliasen, sum hevði verið hangandi miðvallari, varð settur fram í álopið. Tað var ein smeitur, tá ið Magni á Lakjuni noyddist at taka seg av válinum. Síðstu tíggju minuttirnar var Teitur Joensen á vøllinum í staðin fyri vongverjan í høgru. Teitur Joensen er fyri stuttum fluttur til ÍF. Undanfarnu árini hevur hann spælt við EB/Streymi.

Men ÍF fekk einki mál. Tað vóru teir sjálvsagt vónbrotnir um. Tað nyttar ikki so nógv og tað er neyvan nøkur troyst í veruleikanum, at teir høvdu verið annar parturin í góðum undirhaldi, hóast umstøðurnar kundu havt verið betri. Men tað er einki at ivast í, at fleiri stig bíða eftir fuglfirðingum, sum hósdagin fer at fáa vitjan av meistarunum úr HB.

Skálamenn mest sum ganga á vatninum. Higatil hava teir ikki tapt, og teir mugu finna seg í, at nú eru tað teir, sum fara at verða roknaðir sum favorittar, tá ið teir hósdagin fara á Svangaskarð.

**Dysturin í tølum**
**Skála-ÍF 4-3 (3-3)**
1-0: Bogi Gregersen 2.
2-0: Bogi Gregersen 5.
2-1: Rúni Elttør 12.
2-2: Høgni Zacharisen 30.
2-3: Magni á Lakjuni 40.
3-3: Iulian Florescu 45.
4-3: Jónhard Frederiksberg 67.
**Dómari:** Páll Augustinussen
**Skála:** Igor Bjarni Kostic- Bárður Danielsen, Arnhold Berg (Ronni Hansen, 90.), Iulian Florescu – Hanus Thorleifsson, Nenad, Pauli G. Hansen, Alexandur Johansen (Eugen Marian Stanceu, 85.) – Bogi Gregersen, Jónhard Frederiksberg
Gult kort: Iulian Florescu
**ÍF:** Kartin Joensen – Árni Petersen (Teitur Joensen, 80.), Viggo Johannesen, Áki Petersen, Rúni Elttør – Roy Róin (Bárður á Lakjuni, 55.), Fritleif í Lambanum, Hanus Eliasen, Høgni Zachariasen –Magni á Lakjuni (Eyðun Ryggshamar, 68.), Bartal Eliasen
**Gult kort:** Fritleif í Lambanum

# Bogi tók av

Síðani skálamenn fingu rumenska álopsmannin, sum teir kalla Pujo, hevur tað ikki verið pláss fyri Boga Gregersen millum teir fyrstu ellivu. Sunnudagin hevði Johan Nielsen tó gjørt av, at rumenin skuldi sita á beinkinum, og at Bogi skuldi fáa møguleikan.

Og Bogi tók av. Tá ið fimm minuttir vóru farnir, hevði hann skorað tvey mál. At hava skorað tvær ferðir eftir so lítlari løtu, sigur málskjúttin seg ikki hava gjørt áður.

– Tað var hugaligt, og viðspælararnir syrgdu fyri góðum uppleggum. Í tí fyrra førinum skuldi eg bara seta fótin á, eftir at Jónhard Frederiksberg hevði lagt innfyri, og bólturin umvegis eitt ÍF bein kom til mín. Í seinna førinum legði Hanus Thorleifsson innfyri, og síðani stýrdi Alexandur Johansen bóltinum við høvdinum niður fyri føturnar á mær.

Verður tú millum teir fyrstu ellivu á Svangaskarði?

– Tað ger venjarin einsamallur av. Sjálvandi vónar tú altíð at vera inni beinanvegin, og eg haldi, at tað gekk hampuliga væl, tá ið eg fekk møguleikan. Eg hevði møguleikar at gera fleiri mál, men tíbetur fingu vit kortini øll stigini. ÍF var við upp á tað, men vit høvdu takið á teimum, og vit spældu okkum til fleiri málmøguleikar, enn teir megnaðu at gera.

**- jh**

LÍF-VB 2-2 (2-0):

# Treiskir vágbingar

Tað sá leingi út til, at LÍF skuldi fara at fáa fyrsta sigurin á árinum, tá teir leygardagin høvdu vitjan av VB.

Ikki minst mundi støðan kennast hugalig hjá heimaliðnum, tá teir í steðginum vóru framman fyri við tveimum málum, men vágbingar høvdu tó ikki hug at geva seg.

Og tað skuldi eisini vísa seg, at tað kann loysa seg at treiskast, tí vágbingar megnaðu at bjarga sær annað stigið úr Leirvík. Fyrst minkaði Mikael í Lágabø um munin, og síðani var tað Sigmundur Mikkelsen, sum skoraði til 2-2.

Talan var um fyrsta stigið hjá báðum pørtunum.

LÍF-VB 2-2 (2-0):
1-0: Sølvi Vatnhamar
2-0: Magni Høgnesen
2-1: Mikael í Lágabø, br
2-2: Sigmundur Mikkels